TING-HELLAN

# Hvør sveik hvønn hasa svikaligu náttina

TINGHELLU-KLUMMAN

*av Niels Una Dam, cand. comm.*



Nógv hevur verið skrivað og brigslað í Havn síðan býráðsvalið. Ja, nýggi borgarstjórin Heðin Mortensen er enntá koyrdur úr Sambandsflokkinum. Skrivingin hevur verið dekan ov einsíðug.

Tað er ikki í lagi at bróta skrivligar avtalur, ella at fara aftur um ryggin á sínum samgongufeløgum. Øll javnaðarumboðini; Heðin, Katrin og Elin, hava sýnt ódámligan atburð, tað er teirra val. Men at siga at Heðin hevur arbeitt ímóti endamálunum hjá Sambandsflokkinum er ikki rætt.

Hví undirskrivaði Heðin avtaluna við Fólkaflokkin, tað er trupult at skilja. Men tað er líka trupult at skilja hví Beate og Høgni gjørdu tað.

Sambandsflokkurin hevði eitt vána val. Flokkurin var 18 atkvøður frá at missa tvey umboð. Ringa valið var ikki orsakað av Heðini, sum var næststørsti atkvøðuslúkur á býráðsvalinum. Heðin fekk 100 atkvøður fleiri enn sitandi borgarstjóri. Hann var sostatt upplagdur til sessin. Sambandsflokkurin sat í eini lyklastøðu, og hevði møguleika at krevja borgarstjóran. Tey kundu sjálvandi ikki góðtaka status quo eftir ein sovorðnan frammaná frá veljaranum, men hví stóð sambandsflokkurin ikki saman um kravið um borgarstjórasessin?

Endamál flokksins er altíð at fáa mest møguliga ávirkan, so vóru tað ikki Høgni og Beate sum virkaðu ímóti endamáli flokksins?

Vóru tað ikki tey sum sviku?

Áttu tey ikki at verið koyrd úr flokkinum, sambært grein 11 í viðtøkum valfelagsins?

Men nei, valfelagið koyrdi Heðin úr flokkinum. At sleppa sær av við borgarstjóran er ikki eiti á hjá einum flokki, og serliga ikki hjá einum flokki sum er í kreppu. Við Heðini missir flokkurin meiri enn ein triðing av atkvøðunum, so hetta er eitt stórt stig. Spurningurin er so, hvussu vælumhugsað hettta stig var. Hví kennir flokkurin seg so snýttan av Heðini?

Tað er væl skilligt, at fólkaflokksmenn kenna seg snýttar, men sambandsmenn?

Valfelag Sambandsflokksins í Suðurstreymoy: Føroya Væl kann ikki siga, at tey ikki vistu, at Heðin hevði ein borgarstjóra í búkinum. Vit minnast øll, at fráfarandi borgarstjóri Jan Christiansen segði seg ikki kunna fara á vesið, uttan at Heðin kallaði seg virkandi borgarstjóra.

Føroya Væl kann ikki siga, at tey ikki roknaðu við at Heðin fór at verða størsti atkvøðuslúkurin hjá flokkinum. Heðin hevur, síðan Lisbeth fór úr kommunalpolitikki, verið høvuðsnavnið á sambandslistanum.

Føroya Væl visti, at Heðin kendi seg illa viðfarnan eftir løgtings-valið, tá Sambandsflokkurin gjørdi sær ómak at halda Heðin úr Løgtinginum.

Tá Føroya Væl valdi at stilla Heðin upp, bundu tey seg til at arbeiða fyri at gera hann til borgarstjóra. Hetta skyldaðu tey einum manni, sum hevur arbeitt so hart fyri at fáa flokkinum atkvøður í so nógv ár.

Føroya Væl kann ikki siga, at Heðin arbeiddi ímóti flokkinum; hann var einasta umboðið sum arbeiddi fyri flokkinum.

Heðin mundi vera stak vónbrotin eftir fundin við Fólkaflokkin hasa náttina eftir valið. Tað er væl skilligt, at hann valdi sjálvur at royna eftir borgarstjórasessinum, tí í Sambandsflokkinum fekk hann ikki hjálp.

Nú kunnu havnafólk spent seta seg til rættis og hyggja hvussu leikur fer í Býráðnum, tí um undirhaldsvirðið hesa fyrstu vikuna leggur støðið fyri valskeiðið, so verður tað forbiðið stuttligt.

# Geysir og Atlants Kolvetni bjóða saman



*Umboð fyri Geysir og Atlants Kolvetni leggja seinastu hond á umsóknirnar til 2. útbjóðing*

*Mynd Jens Kristian Vang*

OLJULEITING

*Jan Müller*

Bæði tey føroysku oljufeløgini eru við, nú kallað verður út til 2. útbjóðing á landgrunninum. Atlants Kolvetni og Geysir haa skipað seg í eitt samtak, sum søkir eftir fleiri teigum, serstakliga har norðuri. Atlants Kolvetni var í 1. Útbjóðing saman við eitt nú Amerada Hess og BG. Hvørki av teimum feløgunum eru við nú. Føroya Kolvetni, sum í 1. útbjóðing var saman við ENI, bjóðar nú saman við øðrum feløgum, eftir øllum at døma saman við einum ella fleiri av hesum feløgum, Statoil, ChevronTexcaco, Dong og Shell.

Hetta er annars fyrstu ferð, at ílendsk-norska oljufelagið Geysir er við í leiting á landgrunninum. Stjórin har er ein gamal kenningur á føroyaøkinum, Terje Hagevang. Hann var stjóri í Saga Petroleum, sum gjørdi stórt kanningararbeiði her í 90-unum, men sum seinni varð uppkeypt av Norsk Hydro.

Terji Hagevang sigur við Sosialin, at hann er sera fegin um, at teirra felag nú kann fara inn í eitt samstarv við føroyska oljufelagið. Hóast tað ikki hevur eydnast hvørki Geysir ella Atlants Kolvetni at sleppa við í nakrar av teimum meira tungu samtøkunum við stórum og peningasterkum oljufeløgunum, so heldur Terje Hagevang, at eisini smærri oljufeløg kunnu geva eitt gott íkast til leitingina við Føroyar. –Nú eru ikki so nógv oljufeløg, sum bjóða, og vit halda okkum hava nakað at geva. Tað er týdningarmikið fyri at varðveita virksemi, at tað verður tikið væl ímóti øllum feløgunum, sum vísa áhuga og fáa møguleika til at vísa, hvat tey kunnu gera.

Terje Hagevang leggur aftrat, at tað er ikki bara kapitalurin, sum telur, men tað er eisini kompetanca og kunnleiki. Hann vísir á, at Geysir er annars farið at savna inn kapital til komandi kanningar og møguliga boring. Higartil eru savnaðar 13 mill.kr. í Noregi, men ætlanin er at savna meira kapital í næstu framtíð, eisini í Íslandi og Føroyum.

Terje Hagevang sigur, at brúk er í fyrsta lagi fyri pengum til at gera seismiskar kanningar av basaltinum. Teir hava liggjandi úrslitini av eini Hightech seismiskari kanning, sum nú kunnu brúkast. Tey bæði feløgini hava søkt um fleiri teigar og liggja teir m.a. norðaliga og nakað inni á landgrunninum. Strukturin, sum feløgini síggja stórar møguleikar í, verður nevndur Durita. Terji Hagevang hevur áður umrøtt henda í Sosialinum og hevur mett, at talan kann vera at finna bæði olju og gass. Møguleikin fyri stórum gassfundi eru rímuliga stórir segði hann tá og samanbar hann við stóru gasstrukturarnar á djúpum vatni í norskum øki. Nú fer tíðin so at vísa, hvat er í hesum.

Hóast Geysir helst hevði viljað verið saman við størri oljufeløgum, so heldur Terji Hagevang, at Atlants Kolvetni er eitt gott felag, sum eisini hevur tætt innlit í føroysk viðurskifti. Bæði feløgini líkjast og hóska tí væl saman.

Wilhelm Petersen, Atlantic Petroleum

# Væl nøgdir at samstarva við Geysir

OLJULEITING

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

– Vit hava arbeitt saman við nógvum stórum feløgum. At vit nú fara at arbeiða saman við einum minni felag sum Geysir halda vit hóskar rímuliga væl til okkum í løtuni. Vit taka ein munandi størri prosentpart. Vit ætla nú at royna henda nýggja háttin fyri at søkja um loyvi saman við einum minni felag og síðani arbeiða fram ímóti at fáa størri feløg uppí, tá vit hava gjørt tær neyðugu teknisku kanningarnar. So ein slíkur samstarvsháttur sum hesin hóskar væl inn í okkara strategi í løtuni.

Wilhelm Petersen vísir á, at teir arbeiða saman við bæði størri og smærri feløgum í bæði Føroyum og Bretlandi, har felagið tó hevur ein væl minni part.

Geysir og Atlants Kolvetni fara, tá og um tey fáa lisens, at hava ein tættan dialog við tey størri feløgini, og her kann bæði vera talan um feløg, sum longu eru á føroyaøkinum og um feløg, sum kunnu hugast at standa á síðulinjuni. Wilhelm Petersen heldur tað eisini kann hava stóran týdning fyri Føroyar, um eitt nú teir sum lisenshavari kunnu gera eitt forarbeiði og rudda slóð fyri at størri og nýggj oljufeløg kunnu koma inn á økið (farma inn seinni).

Neyðugt verður við størri feløgum, sum hava borikompetancu, at koma inn í loyvini seinni, tvs. eftir at Geysir og Atlantskolvetni hava ment og gjørt økið meira búgvið.

Wilhelm Petersen sigur annars, at tað gevur munandi størri dynamikk at hava tey størri feløgini við í eini leitirundu. Hetta hevur man góðar royndir av í Bretlandi. Tað er alt meira vanligt, at tað eru tey smærri feløgini, sum gera forarbeiðið, tvs. fara undir at innsavsna data og tulka hesi, og tá klárt er til at fara undir at bora og fara undir tað meira tyngra arbeiðið , so koma tey størri feløgini við. – Hetta er ein leistur, sum virkar væl í Bretlandi og tað er okkara vóna, at føroyskir myndugleikar eisini taka hædd fyri hesum á landgrunninum.



2. útbjóðing á landgrunninum:

# Átta oljufeløg vilja vera við

**Trý av feløgunum er nýggj**

OLJULEITING

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Eftir øllum at døma ynskja 8 smærri, meðalstór og stór oljufeløg at vera við í oljuleitingini á landgrunninum, nú umsóknir til 2. útbjóðing skuldu vera inni fyri middag í gjár. Feløgini eru Statoil, ChevronTexaco, Shell, Dong, OMV, Faroe Petroleum, Geysir og Atlants Kolvetni. Tey fýra stóru oljufeløgini, sum vórðu við í 1. Útbjóðing fyri fýra árum síðani, BP, Amerada Hess, BG og ENI eru ikki við hesaferð. Men tey eru tó øll virkin á landgrunninum við sínum seks og níggju ára loyvum.

Feløgini komu øll á fund í Oljufyrisitingini í gjár og løgdu fram umsóknir sínar, einar 5-7 í tali. Millum feløgini eru trý nýggj, Tey eru ChevronTexaco, OMV og Geysir. Sigast má alt fyri eitt, at tað er sera hugaligt fyri føroyskar oljumyndugleikar, at eitt av heimsins størstu oljufeløgum, ChevronTexaco eisini vil vera við í leitingini á landgrunninum. Felagið er annars sera virkið hinumegin markið, og nú tað og onnur feløg, sum eisini eru virkin á okkara langrunni, eru farin at søkja um loyvi saman allarhelst beint upp at markinum, so er tað sera lovandi fyri føroyska oljuleiting. At upplýsingar frá stórum fundum beint hinumegin markið eisini kunnu brúkast á okkara landgrunni av somu feløgum, er einki minni enn ein fongur fyri føroyska oljuleiting.

Partur av ChevronTexaco, nevniliga fyrrverandi Texaco søkti eisini um leiti loyvi í 1. rundu, men teir vóru ov stuttir tá. Nú felagið hevur tvífaldað sína støðd og styrki og er saman við feløgum sum Statoil og Dong kann hugsast, at vit í teimum fáa eitt sera gott og vælkoyradni lokomotiv á landgrunninum. Bíðað verður so sjálvandi eisini eftir, at BP lokomotivið skal fara í gongd aftur.



*Rúni Hansen, stjóri í Statoil, heilsar upp á Sigurð í Jákupsstovu frá Oljufyrisitingini*



*Bæði oljufeløg og oljufyrisiting vóru vælhýrd*

OMV er eysturríkst felag og er sera virkið á Atlantsmótinum. Tað er m.a. við í fundum sum eru gjørd við markið og er tað kanska ræ ttiliga n áttúrligt, at tað nú eisini vil kanna sær onkran bita okkara megin markið.

Geysir er somuleiðis nýtt á landgrunninum, men fólkini aftanfyri felagið, hava fyrr arbeitt við føroyskum øki, so her fær Atlants Kolvetni heilt givið ein góðar samstarvspartnara við góðum innliti í føroysku undirgrundina.

Vert er eisini at nevna Føroya Kolvetni, sum er tann stóri skorarin í seinastu runduni í bretskum øki. Nú vil felagið so eisini gera seg meira galdandi á landgrunninum, hvat eisini er heilt náttúrligt. At felagið ikki er ein og hvør sæst m.a. um vit lesa seinastu útgávuna av altjóða oljublaðnum Upstream, har blaðið brúkar ikki minni enn tríggjar síður uppá føroyska oljufelagið og serstakliga stjóra tess, Graham Stewart, sum fær nógv rós og verður vístur stóra virðing í oljuumhvørvi. Ikki kann sigast annað enn , at slík skriving vekir stóran ans fyri Føroyum og leitingini eftir olju her.



*Umboð fyri Atlantic Petroleum og Geysir møttu vælhýrd*



*Niels Sørensen frá Føroya Kolvetni kom við umsókn*

Sigurd í Jákupsstovu:

# Væl nøgdur við umsóknir

OLJULEITING

*Jan Müller*

– Hetta er positivt og eri eg eisini væl nøgdur. Feløg, sum arbeiða miðvíst báðumegin markið hava bjóðað í 2. rundu, og tað er sera lovandi sigur Sigurd í Jákupsstovu, stjóri á Oljufyristingini, nú staðfest er, at eini 8 oljufeløg hava bjóðað. Tað hevur ikki fingið Sigurd í Jákupsstovu at missa vónina, hóast stór feløg sum BP, Amerada Hess, BG og ENI ikki hava søkt, tí tey eru longu virkin á landgrunninum. Hann heldur, at tað er áhugvert at síggja, at mong av feløgunum, sum arbeiða bæði í bretskum og føroyskum øki, nú eru við í 2. Útbjóðing eisini, tí jarðfrøðin kennir sum so ikki mørk. Herfyri segði Sigurd í Jákupsstovu, at um bert eitt felag søkti, so fór hann at vera vónsvikin. Men søktu 3 feløg, so tók hann tað sum nakað positivt. Nú er úrslitið so 8 feløg og Sigurd og hansara fólk fara nú til verka at lesa umsóknirnar og síðani at koma við tilmælum um loyvi. Hetta verður fyrst í komandi ári.